# INNBJÓÐING

Í sambandi við vitjanina frá Dansk Projektledelse v/ Morten Fangel, bjóðar FVL til evnisdag um verkætlanarleiðslu **fríggjadagin 12. september á Hotel Hafnia, Høllini.**

Evnisdagurin er ætlaður bæði almennu umsitingini og vinnulívinum og vendir sær serliga til fólk við ábyrgd fyri verkætlanum, og annars teimum, ið hava áhuga at menna sín førleika innan verkætlanarleiðslu.

**Fyrrapartin kl. 9.00 – 12.00 verður fyrilesturin: "Tendenser i Nordisk Projektledelse"**
við Morten Fangel. Evnini, sum verða viðgjørd eru serliga málrættað tykkum sum eru virkin í stýrisbólkaarbeiði, t.d.

- Uppgáva, manning av stýrisbólkum
- Teir ymisku leiklutirnir í verkætlanarleiðslu
- Samstarvið millum stýrisbólkaformannin og verkætlanarleiðaran
- Tilrættalegging av verkætlanarleiðsluni
- Verkætlanar- og leiðslumyndlar

**Tilmelding** fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á konto felagsins, sum er 9181 1484534. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri limir og 500 kr. fyri ikki limir. Íroknað kaffi/te og morgunmatur.

**Seinnapartin kl. 13.00 – 15.00 verður kunning um IPMA sertifiseringina.**
Øll ið hava áhuga fyri sertifisering ella ætla sær at melda seg til sertifisering, sum skipað verður fyri í vetur, er vælkomin. Tað er ókeypis at luttaka og tilmelding er ikki neyðug.

**Morten Fangel**
Morten Fangel er stjóri hjá Dansk Projektledelse og hevur staðið á odda fyri menningini av altjóða IPMA sertifiseringini. Morten Fangel hevur granskað, skrivað bøkur, ritstjórnað søvnum og tíðarritum um verkætlanarleiðslu. Umframt holla útbúgving og vitan er Morten Fangel eisini kendur fyri síni heilt serstøku evni at bera fram sína vitan um verkætlanarleiðslu, bæði til toppleiðslur, verkætlanarleiðarar og -starvsfólk – bæði sum ráðgevi, fyrilestrarhaldari og sum undirvísari á skeiðum og vísindaligum ráðstevnum.

**Øll eru vælkomin.**

Føroysk Verkætlanarleiðsla
Partur av Dansk Projektledelse




## Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**

SUNDA KOMMUNA

# Lærarastarv við Hvalvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til Hvalvíkar Skúla frá 15. septembur 2008 til 30. juni 2009.

**Lærugreinir:**
- Danskt í 3. flokki
- Danskt í 4. og 5. flokki
- Tilevning í 2. og 3. flokki
- Heimstaðarlæra í 1., 2. og 3. flokki ella ítróttur, svimjing í 2., 3. og 4. flokki
- Kristni í 1. flokki
- Hondarbeiði í 4. og 5. flokki
- Náttúra og tøkni í 4. og 5. flokki

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett í staðin.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er parttíðarstarv, uml. 19 tímar um vikuna, og verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin **16. septembur 2008, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aslaug Olsen, skúlaleiðara, á telefon 422028 ella 772028.

Umsóknir vera sendar til:
Hvalvíkar skúla
Skúlavegur 1
430 Hvalvík

**Hvalvíkar skúli** hevur 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.

## Jørð í Nólsoy til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er 1 gyllin uttangarðs, matr. nr. 210 Heimara helvt í Nólsoy, og matr. nr. 114 innangarðs í Nólsoy, til sølu.

**Áhugað kunnu ringja 580127**

veitst tú ikki tað? Sosialurin

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



## Íbúð á Boðaneshamri til sølu

Nýggj og snotulig íbúð, 76,5 m², á Boðaneshamri við frálíkum útsýni yvir Nólsoyarfjørð er til sølu.

Íbúðin er innrættað soleiðis:

Durur, køkur og spísistova í einum við dragihurð inn í dagligstovu, altan við útgongd frá spísi- og dagligstovu, kamar við klædnarrúmi og baðirúm við brúsu. Við í keypinum eru hvítvørur og flatskermur umframt eitt úthús á 4 m².

Íbúðin er ein endaíbúð á 1. hædd í blokki 1 og verður seld, um nóg høgt boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovuna, Káru á Dunga.

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo



## Tvíhús til sølu á Heygsvegnum 16 Tórshavn

Talan er um eini nýgg tvíhús har alt er gjørt bæði innan og uttan.

Húsini eru í tveimun hæddum, á veghæddini eru 3 kømur, baðiverilsi, bryggers og gongd, á 1. hædd er stova og køkur við atgongd til altan, kamar við atgongd til altan og baðirúm.

Húsini liggja væl fyri, 10.min oman í býin, sera góðan sólargang og gott útsýnið.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst, minsta boð er 2.450.000 kr.

**VALBJØRN DALSGARÐ**
RYGSGØTA 20 FO-160 ARGIR
TLF 319279 MOBIL 512118 FAX 312118
MAIL VALBJORN@VALBJORN.FO
WWW.VALBJORN.FO